# Suðuroyingar sleppa framat

**Seinni í hesum mánaðinum sleppur vinnulívið í Suðuroynni at hitta landsins hægstu poltiikarar og umboð fyri oljufeløgini andlit til andlit. Samstundis verður eisini almennur fundur í Suðuroynni har fólk kunnu seta okkara fremstu politikarum spurningar**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

Nú skulu suðuroyingar sleppa framat at vísa, hvat teir duga. Samstundis sleppur meinigi maðurin í Suðuroynni at hitta okkara fremstu politikarar, andlit til andlit.

Tað varð einasta ítøkiliga úrslitið av fundinum mikudagin ímillum Landsstýrið og Suðuroyar Oljuvinnuráð, sum vit eisini hava greitt frá aðrastaðni í blaðnum.

Á fundinum við Suðuroyar Oljuvinnuráð, varð landsstýrið umboðað av Anfinni Kallsberg, løgmanni, Høgna Hoydal, varaløgmanni og Eyðuni Elttør, landsstýrismanni í oljumálum .

Viberg Sørensen sigur, at á fundinum varð leingi tosað aftur og fram um støðuna í Suðuroynni.

– Tað einasta, sum kom burturúr, var, at teir tríggir landsstýrismenninir, sum vóru á fundinum, játtaðu at koma til Suðuroyar at hitta oyggjarfólkið andlit til andlit.

– Teir skulu eisini heita á umboð fyri oljufeløgini, sum eru í Føroyum, um at koma við til Suðuroyar.

– Á hesum fundinum skulu umboðini fyri Landsstýrið og oljufeløgini hitta umboð fyri vinnulívið í Suðuroynni.

Sostatt fær vinnulívið í Suðuroynni høvi til at vísa seg fram beinleiðis fyri Landsstýrinum og fyri oljufeløgunum.

Viberg Sørensen sigur, at hetta er eitt høvi hjá teimum virkjum í Suðuroynni, sum hava áhugað í oljuvinnuni, at greiða frá hvørjar ætlanir tey hava, hvat tey eru før fyri og, hvørjar dygdir, tey hava.

– Tað er eisini neyðugt, at vinnan í Suðuroynni vísir, hvat hon dugir til og tað fær hon so høvi til á hesum fundinum við oljufeløgini og Landsstýrið.

Samstundis er ætlanin at hava ein fólkafund í Suðuroynni, har almenningurin í oynni sleppa at seta landsstýrisminnunum spurningar og at greiða teimum frá støðuni annars.

Formaðurin í Oljuvinnuráðnum sigur, at nú skulu fundirnir í Suðuroynni fyrireikast.

Men tað, sum fyribils liggur í kortunum, er, at fundirnir verða leygardagin 17. februar.

*Lesið meira á síðu 10*



*– Nú sleppur bæði vinnulív og almenninguri í Suðuroy at greiða Landsstýrinum frá støðuni og at seta teimum spurningar um, hvat teir ætla við oynni. Tað var einasta úrslit av fundinum ímillum landsstýrið og Suðuroyar Oljuvinnuráð mikudagin. Her eru tað f.v. Tummas Thomsen, nevndarlimur í oljuvinnuráðnum, sum heilsar uppá Herálv Joensen, aðalstjóra í Oljumálastýrinum. Í stólinum situr Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð*

*Mynd Jens Kr. Vang*




LESIHESTUR ELLA BÓKAORMUR



Vit leita eftir einum ágrýtnum og bjartskygdum **lærlingi**, sum dámar væl at lesa.

Tú skal hava FHS, HH, Studentaskúla ella HF *prógv*.

Lærutíðin er millum **tvey og trý ár**, í mun til hvørja skúlagongd tú hevur.

Tú sleppur niður til Danmarkar **Á SKEIÐ** fýra ferðir í lærutíðini.

Vit hava eitt ***spennadi*** arbeiðsumhvørvi við NÝMÓTANS tøkni, og leggja dent á at veita góða TÆNASTU.

Arbeiðið er *FJØLBROYTT.* Tú kemur m.a. at arbeiða við avgreiðslu, vørumóttøku, bíleggingum, lýsingum og sølu framsýningum.

Vit hava nógvar útlendskar kundar og bíleggja eisini nógv úr útlandinum, so um tú hevur eitt gott **málsligt** oyra, er hetta ein fyrimunur.

Lat okkum frætta frá tær:

Bókasølan
SMS • Postboks 1247 • Tel 319575
www.bokasolan.fo


# Sluppu undan verkfalli

**Seinnapartin fríggjadagin góðkendi Fíggjarmálastýrið sáttmálarnar ímillum Føroya Arbeiðarafelag og kommunur kring landið um dagrøktarararnar. Sostatt slapst undan verkfalli á hesum sinni**

SÁTTMÁLALASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

Seinnapartin fríggjadagin bleiv tað greitt, at dagrøktarmammurnar kring alt landið fóru ikki í verkfall mánamorgunin. Tí tá góðkendi Fíggjarmálastýrið sáttmálarnar í millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunurnar kring landið um dagrøktarar.

Annars hevði Føroya Arbeiðarafelag boðað frá, at góðkendi Fíggjarmálastýrið ikki sáttmálarnar í farnu viku, fóru dagrøktararnir kring alt landið í verkfall frá í gjáramorgunin klokkan sjey at rokna.

Ósemja tók seg upp ímillum Førooya Arbeiðarafelag og Fíggjarmálastýrið um sáttmálarnar við dagrøktararnar, eftir at Fíggjarmálastýrið boðaði frá, at tað vildi ikki góðkenna sáttmálarnar.

Føroya Arbeiðarafelag gjørdi greitt, at nú sáttmáli varð gjørdur við kommunurnar, metti tað samráðingarnar at verða endaðar og tað fór ikki at taka tær uppaftur.

Men, nú nakrar fáar tímar áðrenn freistin, sum Føroya Arbeiðarafelag setti, varð úti, boðaði Fíggjarmálastýrið frá, at tað góðkennir sáttmálarnar.

Stýrið sigur, at sáttmálarnir eru góðkendir, eftir at Kommunurnar hava boðað frá, at tað bar ikki at koma longur við samráðingum við Føroya Arbeiðarafelag.

– Hóast Fíggjarmálastýrið metir tað óheppið, at sáttmálarnir ikki eru heilt eins, og hóast sáttmálarnir á onkrum økjum víkja frá tí, sum hevur verið vanligt innan barnaasing, verða tó allir sáttmálarnir á hesum sinni góðkendir, sigur Fíggjarmálastýrið.

Men Fíggjarmálastýrið boðar samstundis frá, at ein fyritreyt fyri góðkenningini er, at bæði kommunur og formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag hava boðað frá, at framyvir verður miðað eftir einum felags sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og kommunurnar, so at allir sáttmálarnir verða líka.

Ein onnur fyritreyt er, at kommunur seta seg í samband við Fíggjarmálastýrið í góðari tíð, áðrenn farið verður til samráðingar eina aðru ferð, fyri at leggja karmin fyri samráðingunum í fasta legu.

Fíggjarmálastýrið ger annars vartvið, at lønin, sum er ásett í sáttmálanum er hægri enn vanligt hevur verið á økinum. Samstundis heldur stýrið, at tað er óheppið, at dagrøkatar hava frí 1. mai, tí higartil hevur tað ikki verið frídagur á barnansingarøkinum

Fíggjarmálastýrið sigur, at ein orsøk til, at tað skal góðkenna sáttmálarnar, er fyri at tryggja eitt javt, alment lønarlag.



# Karsten Hansen kannar íbúðartrupulleikarnar



**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer nú at kanna, hvat kann gerast við vaksandi íbúðarneyðina. Landsstýrismaðurin útilokar ikki, at skattalógin verður broytt, so tað loysir seg betri at leiga út.**

ÍBÚÐARNEYÐ
*Magnus Dam*

Økta virksemið í landinum hesi seinastu árini hevur av álvara lagt trýst á íbúðarmarknaðin. Í Havn og teimum størri plássunum er næstan ógjørligt at finna eina íbúð, og prísirnir eru í flestu førum himmalhøgir.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer nú at kanna, um okkurt kann gerast fyri at minka um íbúðarneyðina. Hetta segði hann í løgtinginum týsdagin, tá hann svaraði einum fyrispurningi frá Rúnu Sivertsen, løgtingskvinnu hjá Fólkaflokkinum.

Rúna Sivertsen vísti á stóru íbúðarneyðina og vildi hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur nakrar ætlanir um at royna at bøta um støðuna. Ein háttur kundi verið at linka skattingina av inntøkum frá leigumálum, tí í dag loysir tað seg alt ov illa at leiga út, vil Rúna Sivertsen vera við.

Tingkvinnan vísti á, at norðmenn hava broytt skattalógina, so tað loysir seg betri at leiga út, og har hevur hetta bøtt munandi um íbúðarneyðina.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er ikki so heitur fyri at broyta skattalógina til frama fyri leiguinntøkur, tí tað er prinsipielt skeivt at gera undantøk til tess at loysa ein akuttan trupulleika. Skulu útleigararnir styðjast á einhvønn hátt, so er tað betur, at stuðul verður útgoldin beinleiðis, eins og rentustuðulin verður nú. Á henda hátt er stuðulin sjónligur á fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Karsten Hansen útilokar ikki møguleikan fyri at broyta skattalógina á onkran hátt, og í øllum førum má okkurt gerast fyri at loysa trupulleikan. Ein møguleiki er at gera tað lagaligari hjá pensjónistum. Sum er, verður leiguinntøka mótroknað í pensjónini.

– Umhugsað kundi verðið, um hendan mótrokningin kundi verðið tikin av, soleiðis at tað loysir seg betur hjá pensjónistum at leiga út, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen sigur harafturat, at Fíggjarmálastýrið og Toll- og Skattstovan fara at kanna, hvussu norðmenn hava sett skattligu tiltøkini í verk, og hvussu tey hava virkað.

– Út frá hesum kanningunum fæst uttan iva eitt gott grundarlag fyri at taka støðu til, um skattingin av leiguinntøku skal gerast lagaligari, sigur Karsten Hansen.

## Ber ikki til at niðurlaga blokkin

Landsstýrið sigur í uppskoti sínum til fólkaatkvøðu, at blokkstuðulin úr Danmark skal niðurlagast fram til 2012.

Hetta ber sambært Móðurmálsorðabókini ikki til. Tað ber ikki til at laga nakað niður. Tú kanst laga ein garð, men tá byggir tú hann upp. Skal tú hava garðin burtur aftur, kanst tú taka hann niður. Tú kanst ikki laga hann niður.

Skal landsstýrið minka blokkin fram til 2012, ber til at læga hann – við seinna æ. Á Síðu síðu 733 í Móðurmálsorðabókini ber til at lesa um orðið læga. Læga merkir at gera lægri ella at lækka.

Tískil ber til at læga blokkin, men ikki at niðurlaga hann.


